# Gullradio úr Runavík

**Stóran part av degnum í dag hevur Rás 2 sent gullradio úr Runavík í sambandi við, at NSÍ hevur vunnið meistaraheitið í Formula-deildini. Nógvir gestir vóru í studionum hjá vertunum Hera Simonsen og Kára Mikkelsen. Her eru nakrar myndir frá Rás 2, sum sendi frá hølunum hjá Norðoya Sparikassa í Runavík, ið er høvuðsstuðul hjá NSÍ.**

*karim*



*Tríggir NSÍ-veteranar. Sunleif Højgaard og brøðurnir Oddfríður og Eyðun Gaardbo*



*NSÍ-fjepparin, Meinhard, í studio hjá Rás 2*




*Nøkur vælnøgd NSÍ-viðhaldsfólk. Standandi frá vinstru: Eyðun og Oddfríður Gaardbo, Eva Nesstein og Sunvør Christiansen. Sitandi: Dánjal Petur Hansen og Sunleif Højgaard. Børnini eru Meinhard og Vár, ið ganga í barnagarðinum á Mýrunum, har nakrir av føroysmeistarunum vitjaðu fyrrapartin*



*Frá vinstru Anna Hansen, Jenny Troest Davidsen, ávikavist mammur til leikararnar Einar Hansen og Johan Troest Davidsen, Laura Olsen, ivrigur NSÍ-fjeppari og formaðurin í NSÍ, Dánjal Petur Hansen. Standandi Guðrið Lava Olsen, sum arbeiðir í Norðoya Sparikassa, haðani Rás 2 sendi gullradio í dag.*



*Dánjal Petur Hansen, formaður í NSÍ, í práti við Eyðun Kjølbro, undirstjóra í Norðoya Sparikassa*